# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Til minnis um Gunnar hjá Albert og Gunhild



Tann 13. juli andaðist Gunnar Konoy í Keypmannahavn, 64 ára gamal. Gunnar var bæði dani og gøtumaður. Bæði foreldrini vóru úr Gøtu. Pápi Gunnar var Albert Jacobsen, sonur Elspu Sofíu og Óla Jákup í Tjørnustovu í Norðragøtu. Albert misti mammuna, tá ið hann var nýføðingur. Hann kom tá at vaksa upp hjá abbasystrini Marin í Mortanstovu, sum búði í sama túni.

Gunnhild var dóttir Hansinu og Símun Paula úr Konoy, sum var ein kendur politikari tá í tíðini. Abbarnir hjá Gunnar, Óla Jákup og Símin Pauli, høvdu tað í felag, at teir vóru við til at stovna Føroya Fiskimannafelag í 1910/11, og Símun Pauli var formaður felagsins fyrstu 15 árini, og abbasonur Óla Jákup gjørdist seinni formaður í mong ár.

Albert og Gunhild funnu saman sum ung í Gøtu. Tað vóru ikki so nógvir møguleikar hjá ungfólki í Føroyum tá, so tey fóru niður undan krígnum. Tá ið kríggið kom, slapst ikki heim aftur til Føroya, so tey giftust fyrst í 40-unum og fingu børnini: Jákup Pauli, Gunnar, Elsa og Mortan. Albert fekk starv sum fangavørður, og sum slíkur virkaði hann alt sítt arbeiðslív.

Tískil blivu tey verandi í Danmark, og heim teirra gjørdist eitt rættiligt føroyskt heim í Danmark, har tey búðu úti á Amager í Rødegaard 10. Tey høvdu javnan gestir úr Føroyum og ofta nógvar gestir eisini, so tey máttu fara út teirra egnu song fyri at hýsa gestunum.

Tilknýtið til Føroyar kom at vera stórt, og tey eru øll komin nógv til Føroyar. Tey flestu teirra hava eisini búð skifti í Føroyum. Í Danmark hava nærum øll teirra verið virkin í føroyskum felagslívi, og fleiri av børninum, eisini Gunnar, hava sungið í føroyskum kóri í Keypmannahavn.

Gunnar var næstelstur, og vit vóru javnaldrar og systkinabørn. Tað vóru ikki góðar umstøður í Føroyum í 50-unum, tí minnist eg enn, hvussu væl tað kom við at fáa ein klæðning, sum Gunnar var vaksin úr, men sum eg passaði.

Búgvandi í Keypmannahavn lá tað væl fyri hjá Gunnar at fáa eina útbúgving. Hann gjørdist løgfrøðingur og fekk eisini starv sum slíkur. Eitt skifti arbeiddi hann á Almannastovuni í Havn.

Tað sá alt væl út hjá Gunnar. Men so verður hann so ófatiliga raktur av sjúku. Fyrst av sjúku, sum gjørdi, at hann mátti gevast at arbeiða. Afturat hesum fekk hann eina ólekiliga krabbasjúku, har fólk vanliga bert liva fáar mánaðir. Sum frískur ber illa til at ímynda sær, hvussu tað kennist at fáa slík boð.

Men Gunnar tók tað sum ein maður og var púra avkláraður um, at hansara dagar vóru taldir, og at hann bókstaviliga talað gekk við deyðanum í hondini. Hann var framvegis tann fitti og fryntligi Gunnar, sum hann altíð hevði verið. Hann kom at liva tvey ár longur enn roknað varð við, og hann tók hvønn av hesum døgum sum eina gávu. Gunnar var giftur við Susanne, og hon var Gunnari ein sera góður stuðul hesa tíð. Tey vildu uppliva so nógv sum gjørligt, meðan tað enn bar til, og tey náddu eisini eina seinastu ferð til Føroyar, har Gunnar kundi fáa tann føroyska mat, sum honum dámdi so sera væl. Tey vóru eisini júst á eini kampingferiu, nú tímaglasið rann út. Hann slapp undan nakrari stórvegis sjúkralegu og fekk tískil fulla gleði av sínum tilmáldu døgum.

Gunnar átti tvey børn, Christine og Trine, og tvey abbabørn.

Friður verið um minnið um Gunnar, systkinabarnið. Jarðarferðin er ikki ásett enn, men verður lýst seinni.

**ó.**

## Til minnis um Margar føddur 14. februar 1970 deyður 16. apríl 2007



Góði Margar, tungt er at sita her og skula skriva nøkur orð um teg. Tað kennist so óveruligt, at tú ikki er millum okkum longur. Dugi ikki rættiliga at skilja tað, at eg ongantíð aftur skal uppliva títt selskap í hesum lívi.

Hvat skal eg skriva, hvussu nógv skal eg skriva. Síðan fyrstu ferð, eg møtti tær fyri einum tjúgu árum síðan, hava vit báðir upplivað nógv saman, ja, eg veit nógvar góðar søgur. Tað kundi fylt eina tjúkka bók. Saman hava vit stríðst á sjónum, hvussu vit á landi klandaðust um gentur og blakaðu við brosmum, ella sum tú kallaði tær, springbóltar, forbannaðir gummifiskar. Tá tú stóð blóðreyður í høvdinum við krivjingarpavnin umborð á Polarstjørnuni, tá var tú ikki blíður og tað hjálpti ikki upp á støðuna, at eg stóð og flenti. Tað er bert ein av mongum sjónum, ið eg aldri fari at gloyma. Nei, mangan hava vit flent at tí. Tað var sum oftast eg, sum flenti, tí var tað nakað, tær ikki dámdi, ja so var tað gummifiskar, og tú helt ikki, at tað var nakað at flenna at.

Altíð hevur okkum dámað væl at gera løgin ting, sum hina ferðina, tá ið vit fóru í býin klokkan nýggju um morgunin stutt fyri jól fyri einum tíggju árum síðani. Ein posa av karamellum í part og eina nissuhúgvu á høvdinum, og so gingu vit runt og ynsktu fólki eini gleðilig jól og bjóðaðu karamellur. Seinni pyntaðu vit jólatræ og sungu Gleðilig jól so hart, sum vit kláraðu tað. Tað vóru eini jól, sum eg aldri fari at gloyma.

Hvat við hini ferðini, tá ið vit fóru at gera bollasuppu heima hjá vermammu tíni. Vit fóru í holt við at vaska upp, meðan vit bíðaðu eftir suppuni, og einar tveir ella tríggjar tímar seinni høvdu vit vaskað alt húsið. Tá var vermamman glað og suppan køld.

Eg kann blíva við at skriva um ting, um vit hava gjørt saman, men eg haldi eg skal skriva eitt sindur um teg. Tú er tað einasta menniskja, ið eg veit um, sum hevur fingið bót fyri at blíva yvirkoyrdur á eini gongubreyt, veriðmeira enn fimmhundrað ferðir í fullubrummuni og álíkavæl kundi flenna at tí. Tú var ein fittur drongur, og eg veit, at tað vóru nógv, ið vóru góð við teg.

Ja, tað fer at verða tómt uttan teg og saknurin er stórur. Tað følist sum hevur onkur bitið eitt stórt petti av mínum hjarta. Tungt er at hugsa um, at tú ikki er millum okkum longur. Má bert royna at hugsa, at tú hevur tað nógvar ferðir betur, har tú er nú, enn tú nakrantíð hevði tað her á foldum.

Ja, Margar góði, hjarta mítt grætur og leingist eftir tær. Hvíl í friði. Eg elski teg.

**Vinur tín, Høgni Kryll**